# *E - og tónleikurin*

**Fróði Holm Knudsen, journalistur á BT**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Ja, klaveri.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Nei.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Ja, millum annað.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Ja, tað býr ein Barbara Streisand djúpt inni í mær, hehe...

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Alt. Eg kann til dømis ikki hava ein sjeik, sum hevur ein heilt annan smak, enn eg havi.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/ bond eigur tú?*
– No idea, men nógvar.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– »Guilty« vid Barbaru Streisand og Barry Gibb. Suverent besta poppalbummið nakrantíð!

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Gudiligar fløgur generelt. Eg vil heldur í fongsul enn at eiga sovorðið.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Ymiskir homofobiskir reggae-sangir frá Jamaica!

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Sissel Kyrkjebø (sjálvt um hon sum persónur er øgiliga fitt!).

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– »Beautiful« hjá Christina Aguilera.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– »Malan« við Maluni Eyðunsdóttir.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Beint áðrenn eg fari heim úr býnum sunnumorgun, vil eg hoyra »Slow« við Kylie Minogue.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Gudiligur tónleikur.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– »Music« vid Madonnu.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– Nú spyrt tú so nær...

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– »Never Give Up« hjá Barbaru Streisand.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Madonna.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Madonnu.


Pierre Fabre



Demo-dagar 1. og 2. des.

Mánadagin 1.desember verður møguleiki at hitta Kristinu Ziska Peters, ráðgeva frá Pierre Fabre á Tjaldurs Apotek frá:
13:00 - 17:30

og á Eysturoyar Apoteki 2. desember
frá: 10:00 - 11:30
13:30 - 15:00

Vit lata 20% í avsláttri av øllum Pierre Fabre vørum hesar dagar.

Tjaldurs Apotek - Tlf: 341100 - www.apotek.fo
Eysturoyar Apotek - Tlf: 471200

Pierre Fabre


whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Gudny Langgaard, gudny78@msn.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Brússel – høvuðsstaðurin í Evropa

Flest øll kenna belgiska høvuðsstaðin sum heimið hjá Evropasamveldinum. Orsøkin til tess, er, at høvuðskontórið hjá ES Tinginum, ES-Ráðnum og ES-Nevndini eru í Brússel. Hetta merkist eisini, tá ið ein kemur til býin. Risa stórir bygningar liggja runt um kring, flott hotell síggjast við fløggum frá limalondunum uttanfyri. Eisini leggur ein til merkis bilmerki, ið sjáldan eru at síggja heima hjá okkum, umframt at flest allir menn og allar kvinnur eru í dýrum jakkasettum, blankum skóm og dokumentmappum. Tó, so er Evropasamveldið ikki tað einasta, ið ein festir minnið við, eftir at hava verið í Brússel.

Fyrst av øllum er tað ikki nógva staðni í heiminum, at alt alment, so sum bygningar, umráði og vegir verða merkti á tveimum málum. Í Brússel, sum einasti býur í Belgia, er tað lóggivið at nýta bæði franskt og flamskt. Hetta hevur tískil við sær, at alt alment hevur tvey nøvn og eru flest allir íbúgvar, vaksin sum børn, før fyri at skifta ímillum hesi bæði ymisku málini, uttan stórvegis trupulleikar. Umframt at vera vertur fyri Evropasamveldið og hava tvey almenn mál, eru eisini nógvir tilflytarar frá Norður Afrika, Turkalandi, Miðjararhavslondunum og fyrrverandi hjálondum hjá Belgia. Hetta hevur við sær, at Brússel er ein tann mest altjóði býurin í heiminum – fullur av ymiskum mentanum og siðum.

Viðvíkjandi gomlum bygningum, fornminnissøvnum og øðrum, er Brússel ein tann mest áhugaverdi býurin í Evropa. Miðbýurin, ið verður róptur "Le Grand-Place", er upprunaliga frá 1200-talinum og bleiv nýttur sum ein marknaður, har ið møguleiki var at keypa breyð, kjøt og klæði. Í 1500 talinum bleiv kommunuhúsið, Hôtel de Ville, reist á staðnum. Tíverri er einans ein partur av Hôtel de Ville at síggja í dag, eftir at Frakland bumbaði mest sum allan býin í 1695. Gjøgnum tíðuna er Grand-Place vorðið nýtt til mangt og hvat, so sum miðdepil fyri átrúnaðarligum tiltøkum í 1500-talinum, tá ið katolikkar royndu at niðurleggja protestantar. Nu á døgum eru vanliga ymiskir marknaðir at síggja har, til dømis í desember verður Grand-Place nýttur sum ein jólamarknaður, har bæði matur, jólaprýði og annað fæst til keyps. Annað áhugavert, ið er at síggja á Grand-Place, eru til dømis Maison du Roi frá síðst í 1800-talinum og Musée De La Ville De Bruxelles, ið fevnir um gamla og nýggja list.

Eisini er nakað í Brússel, ið aldeilis ikki er at síggja heima á klettunum, nevnliga tað sokallaða "Read District Light". Tað er umráðið, har skøkjulevnaður er mest at síggja. Skøkjulevnaður er sjálvandi ikki nakað óvanligt at síggja í høvuðsstøðum runt í Evropa. Tað sermerkta við Brússel í hesum førinum, er, at konufólkini standa nakin til útstillingar í vindeygum.

Umframt mangt annað áhugavert og "minni áhugavert", ið vit tíverri ikki hava stundir at nevna í hesum teldbrævi, er býurin kendur fyri tey góðu og mongu matstøðini, caféir, náttarlívið, klædnahandlar, sunnudagsmarknaðir, sukurlata, vín, ost, øl og annað.

Tíverri kann ikki umgangast, at fólk leggja til merkis gamlar bygningar, vegir og annað, ið ikki eru viðlíkahildnir runt um í Brússel. Hetta er nakað, ið sjálvandi ger býin minni vakran, men tó ikki minni áhugaverdan.




# Stjóri til P/F Fjarhitafelagið

Í sambandi við at stjórin í P/F Fjarhitafelagnum leggur frá sær vegna aldur, verður við hesum lýst eftir nýggjum stjóra.

Hetta er áhugavert starv við nógvum spennandi avbjóðingum og uppgávum fyri framman.

Stjórin í P/F Fjarhitafelagnum hevur um hendi dagligu leiðsluni av felagnum og skal saman við starvsfólkunum skipa fyri nýgerð og rakstri umframt dagligu fyrisitingini. Somuleiðis skal stjórin taka lut á nevndarfundum sum skrivari og annars samstarva við formann felagsins.

**Førleikakrøv**
Tann, ið søkir starvið sum stjóri í P/F Fjarhitafelagnum, skal hava
- útbúgving sum verkfrøðingur ella aðra líknandi útbúgving
- leiðsluroyndir
- góð samstarvsevni

Fyrimunur er, um umsøkjari áður hevur arbeitt við fjarhita og fjarhitaskipanum.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag og/ella avtalu partanna millum.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við CV, arbeiðsváttanum, prógvum og møguligum viðmælum skal verða P/F Fjarhitafelagnum í hendi í seinasta lagi 15. desember 2003.

Starvið er ætlað til setan: 1. mars 2004

Umsóknir skulu stílast til :
**P/F Fjarhitafelagið**
Att. Beate L. Samuelsen, formaður
Postboks 3215
FO 110 Tórshavn
Viðmerkt: Stjórastarv

*P/F Fjarhitafelagið er felag, stovnað av Tórshavnar Kommunu og SEV í 1988. Endamál felagsins er at veita fjarhita í Tórshavnar Kommunu og at gagnnýta avlopshitan frá Kommunalu Brennistøðini á Hjalla og elverkinum á Sundi. Í løtuni hevur Fjarhitafelagið 450 brúkarar. Í felagnum starvast 5 fólk. Nettosølan er 3,6 mió. kr. árliga.*

**P/F Fjarhitafelagið**
Tinghúsvegur 15
Postboks 3215
110 Tórshavn



Føroya Sjómansskúli
Maritime College



## Starv sum sjómansskúlalærari

Søkt verður eftir lærara til Føroya Sjómansskúla frá 1. februar 2004.

Starvið, sum er 3/4 tíð, snýr seg um frálæru í heilsulæru og líknandi.

***Vit kunnu bjóða:***
- Eitt spennandi starv í einum sera góðum umhvørvi, bæði tá tað snýr seg um karmar og samstarv ímillum leiðslu, lærarar og næmingar.

***Førleikakrøv:***
- Góðkendur sjúkrarøktarfrøðingur við hóskandi eftirútbúgvingum og starvsroyndum.
- Helst hava undirvíst áður.
- Kunna undirvísa í heilsulæru, tilbúgving og líknandi lærugreinum.
- Hava góðar samstarvseginleikar.
- Telduførleika á brúkarastøði.

***Setanarviðurskifti:***
- Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Fakfelag Sjómansskúlalærara.

***Umsóknir skulu sendast til:***
Føroya Sjómansskúla,
Nóatún 2, Postboks 104, FO-110 Tórshavn,
***í seinasta lagi mánadagin 10. desember 2003.***

*Útbúgvingarnar á Føroya Sjómansskúla eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO*

Nóatún 2
Postboks 104
FO-110 Tórshavn
Føroyar
Tel +298 357500
Fax +298 357502
farnav@farnav.fo
www.farnav.fo



# Søkt verður eftir dagrøktarum

**til Dagrøktarskipanina í Hósvíkar kommunu. At byrja 2. januar 2004**

Søkt verður eftur dagrøktarum at ansa børnum frá 0 til 10 ár.

Umsøkjarin skal vera vanur við børn, og somuleiðis hava hegni og áhuga í at menna børnini í spæli og álvara, bæði innan- og uttandura.

**Krøv:**
Tað verður kravt at umsøkjarin hevur góðar umstøður innandura og hevur girðing uttandura so børnini kunnu spæla í tryggum umstøðum.

**Umsóknarfreist:**
12. desember 2003.

Skrivlig umsókn verður at senda til

**Dagrøktarskipanin í Hósvík**
Rættarvegur 10 · 420 Hósvík





**Taljur**
**Stroppar**
**Trýst-slangur**
**Spuli-slangur**

**Tórshavnar Maskinhandil**
v/ Tummas Andreasen
Varðagøta 29 - 30
[illegible] Tórshavn - Tlf. [illegible]



**JOB til Fiskere & Søfarere**
**CREW til Rederier, Skibe & Fabrikker**

**www.haraship.dk**

**Haraship - Crew Management**
**Phone: +45 60 60 34 83**
**Email: info@haraship.dk**

HARASHIP



# Mikines plakatir

Nakrar vakrar Mikines plakatir – Toftavatn, Kirkja – til sølu.

**Tlf. 456529 · 756529**


veitst tú ikki tað?


# Frá Leirvíkar Arbeiðsmannafelag

Eykaaðalfundur verður í hølum felagsins 11. desember 2003, kl. 19.00.

Dagsskrá. Limagjaldið 2004.

**Nevndin**